# Ein løgin kensla

**Todi Jónsson helt eftir dystin ímóti sínum barndómsfelagi, at tað var ein løgin kensla at fara út á vøllin sum liðformaður fyri FC Keypmannahavn til ein dyst ímóti KÍ í Klaksvík**

TODI Í KLAKSVÍK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru 11 ár síðani, at tann tá 21 ára gamli Todi Jónsson fór úr Klaksvík umvegis Havnina til Danmarkar, har hann hevur sligið sítt navn fast í donskum fótbólti. Mánakvøldið var Todi fyri fyrstu ferð aftur á vøllinum í Klaksvík, og hesaferð gekk hann á odda fyri felag sítt FC Keypmannahavn.

### Ikki nóg gott

Sum vera man, var Todi Jónsson misnøgdur við, at FC Keypmannahavn noyddist at lúta fyri KÍ. - Sjálandi er tað øðrvísi at spæla á grasliki enn á grasi, og tí skuldu vit venja okkum við vøllin, men tað er ikki nøkur umbering fyri ósigurin. Kanska undirmettu vit eisini KÍ eitt sindur, men hinvegin eiga teir rós fyri at hava spælt ein góðan dyst, segði Todi Jónsson eftir dystin.

Sjálvur leikti Todi í álopinum hjá donsku meist-arunum frá fyrsta bríksli saman við brasiliu-manninum Alvaro Santos, men í hálvleikinum skifti FCK at kalla alt liðið út, eisini Toda. Teir 45 minuttirnar, ið Todi fekk á vøllinum, var onkuntíð nær við, at hann fekk skorað, men tað bleiv við tað.

At áskoðararnir í Klaksvík høvdu eyguni serligani vend ímóti Toda Jónsson, er einki dulsmál, og Todi segði eisini eftir dystin, at hann var greiður yvir, at áskoðararnir væntaðu sær eitt sindur av honum, nú hann var komin á vitjan í heimbýnum við danska felagi sínum.

### Glaðir fyri vitjanina

Hópurin hjá FC Keypmannahavn venur hvønn dag, meðan vitjað verður í Føroyum. Hvønn dag til og við hósdagin verður vant klokkan 11 á Tórsvølli, og tíð er eisini til at taka sær eitt sindur av løttum. Í gjár seinnapartin skuldu donsku fótbóltsmeistararnir ein túr við Norðlýsinum, og ætlanin var at vita, um tað ikki fór at eydnast teimum at fáa eitt kók, greiðir Todi Jónsson frá.

Eisini hava spælararnir hjá FC Keypmannahavn havt høvi til at hyggja seg eitt sindur um í høvuðsstaðnum, og til dømis hevur ein bilafyritøka í Havn latið sjey bilar, sum eru til taks hjá donsku meistarunum, meðan vitjað verður í Føroyum. Todi Jónsson sigur, at liðfelagar hansara og restin av ferðalagnum lata væl at Føroya vitjanini.



Í kvøld skulu danmarksmeistararnir so í dyst við føroyameistararnir úr HB. Tann dysturin verður leiktur á grasi á Tórsvølli, og Todi Jónsson sigur, at tá verður avrikið óivað betur, enn tað var í Klaksvík mánakvøldið.

*Tað var ein løgin kensla hjá Toda Jónsson at ganga á odda fyri FC Keypmannahavn til dyst ímóti barndómsfelagnum KÍ á Djúpumýru í Klaksvík mánakvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Graslíki eingin umbering

**Ítróttarstjórin hjá FC Keypmannahavn, Niels Christian Holmstrøm, helt ikki, at donsku meistararnir kunnu brúka graslíki sum umbering fyri ikki at kunna basa klaksvíkingum**

FCK-VITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið vit fingu orðið á Niels Christian Holmstrøm í hálvleikssteðginum, var hann als ikki nøgdur við avrikið hjá danska liðnum fyri steðgin. Hann helt, at hóast donsku leikararnir skuldu venja seg við at leika á graslíki, so eiga teir at verða so mikið stinnir, at teir eiga at basa einum liðið sum KÍ, hóast teir ikki fáa nakað forerandi frá klaksvíkingum.



*Ítróttarstjórin í FC Keypmannahavn, Niels Christian Holmstrøm, helt ikki, at donsku leikararnir kundu brúka graslíki sum umbering fyri ikki at kunna basa KÍ.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Ikki óvæntað støði

Ítróttarstjórin í FC Keypmannahavn segði í hálvleikssteðginum, at KÍ hevði spælt rættuliga væl, og at klaksvíkingar høvdu verið nær við at gjørt fleiri enn tað eina málið. Niels Christian Holmstrøm rósti klaksvíkingum fyri góðan stríðsvilja, men hann helt tó ikki, at støðið var hægri enn væntað, hóast tað kundi tykjast sum um, at FC Keypmannahavn hevði hug til at undirmeta KÍ.

Spurdur um tað var nakar leikari hjá KÍ, sum Niels Christian Holmstrøm serliga legði til merkis, svaraði ítróttarstjórin í FC Keypmannahavn, at tað vildi hann ikki gera nakrar viðmerkingar til enn, hóast onkur klaksvíkingur hevði gjørt tað rættuliga gott í fyrra hálvleiki eftir hansara tykki.



*Dagligi leiðarin í KÍ, Bill McCleod Jacobsen, var sera errin av sigrinum hjá KÍ ímóti donsku meistarunum úr FC Keypmannahavn.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Leikliga hæddarpunktið

**Dagligi leiðarin í KÍ, Bill McCleod Jacobsen, var sera errin av sigrinum hjá KÍ á donsku meistarunum mánakvøldið**

KÍ-100 ÁR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ein sera fegin Bill McCleod Jacobsen, ið vit fingu orðið á beint eftir dystin ímóti FC Keypmannahavn mánakvøldið. Dagligi leiðarin í KÍ, sum mánakvøldið hevði ábyrgdina av besta liði felagsins, nú danski venjarin, Ove Flindt Bjerg, er í summarfrí, metti dystin mánakvøldið sum leikliga hæddarpunktið í sambandi við 100 ára føðingardag felagsins.

### Serliga søtur sigur

Herfyri vann KÍ 2-0 á donsku bronsuvinnarunum úr Esbjerg, men Bill Mc Cleod Jacobsen viðgongur, at sigurin á donsku meistarunum mánakvøldið var serliga søtur, tí talan var um meistaraliðið, sum haraftúrat hevur ein klaksvíking á liðnum.

At KÍ nú hevur vunnið á tveimum av teimum fremstu donsku liðunum, heldur Bill átti at givið sjálvsálit, áðrenn lagt verður til brots aftur í landskappingini fyrst í august mánaða. Júst sjálvsálitið hevur manglað fleiri ferðir í fyrru hálvu, sigur Bill, sum vónar, at KÍ við eitt sindur meiri av sjálvsáliti fer at gera seg meiri galdandi heilt har frammi í landskappingini eftir summarsteðgin.



# Vinmenn fra barnaárum

**Millum leikararnar í KÍ-hópinum til dystin ímóti FC Keypmannahavn mánakvøldið var Fríðin Ziskason, og hjá honum var talan um ein serligan dyst. Fríðin og Todi Jónsson hava verið floksfelagar øll barnaárini, og eisini hava teir spælt fótbólt saman øll ungdómsárini**

VINMENN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Teir báðir, Fríðin Ziskason og Todi Jónsson, hava verið vinmenn í nógv ár. Teir vóru floksfelagar í skúlanum, og í KÍ hava teir verið á liði saman øll ungdómsárini. Árgangurin hjá teimum báðum, 1972, var sera góður hjá KÍ, og teir vunnu mangt eitt steypi á yngri árum. Báðir komu teir eisini á besta liði hjá felagnum í ungum aldri, og hóast tað nú eru nógv ár síðani, at Todi fór úr Klaksvík, hava teir báðir altíð hildið sambandið við líka.

### Løtt uppgáva at dekka Toda

Tá ið vit fingu eitt stutt prát við Fríðin Ziskason áðrenn dystin, segði hann, at hann vónandi slapp á vøllin at dystast við vinmannin. Fríðin verður bæði nýtur sum verjuleikari og miðvallari, men sjálvur vónaði hann at sleppa at dekka Toda. – Tað hevði verið ein løtt uppgáva, tí eg kenni hann so væl, helt Fríðin Ziskason skemtandi fyri undan dystinum.

Fríðin kom ikki á vøllin fyrr enn seint í dystinum, og tá var Todi ikki longur á vøllinum fyri FC Keypmannahavn, so tískil gjørdist ikki talan um nakra uppgerð teirra millum. Hinvegin kundi Fríðin fegnast um at hava verið við til at bast donsku meistarunum, og tað er ein uppliving í sjálvum sær hjá einum og hvørjum føroyskum fótbóltsleikara. At Fríðin so eisini hevur okkurt at arga Toda við næstu tíðina, ger neyvan upplivingina minni hjá Fríðin Ziskason.



*Vinmenninir báðir, Fríðin Ziskason og Todi Jónsson, sum mánakvøldið vóru á hvør sínum liði, tá ið KÍ og FC Keypmannahavn dystaðust í Klaksvík.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Virðiligt umboð fyri Klaksvík



*Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, heldur Toda Jónsson verða eitt virðiligt umboð fyri Klaksvíkar bý*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, er øgiliga takksamur fyri, at Todi Jónsson kemur til Klaksvíkar at vitja KÍ við felagi sínum FC Keypmannahavn**

ERRIN BORGARSTJÓRI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er einki dulsmál, at klaksvíkingar eru góðir við KÍ. At Todi Jónsson eftir 11 ára útlegd kemur aftur til Klaksvíkar á vitjan við FC Keypmannahavn, sigur sambært borgarstjóranum í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, ikki so lítið um, hvar hjartað hjá Toda Jónsson liggur.

### Virðiligt umboð

Steinbjørn Jacobsen sigur eisini, at ómetaliga nógv børn í Klaksvík síggja upp til Toda, og her er eisini nógv at síggja upp til, tí hann er komin langt í sínum fótbólti. Harafturat heldur borgarstjórin í Klaksvík, at Todi Jónsson á sínari yrkisleið sum fótbóltsspælari altíð hevur verið eitt virðiligt umboð fyri býin, og tað takkar hann Toda fyri.

Nú KÍ fyllir 100 ár í ár sigur Steinbjørn Jacobsen, at týdningurin hjá felagnum fyri Klaksvíkar bý er ómøguligur at meta um, tí hann er so ovurhonds stórur. – KÍ er miðdepilin fyri einum stórum parti av frítíðarlívinum hjá børnum og ungum í býnum, og er felagið ein stórur og týðandi partur av uppalingini hjá einum stórum parti av okkara børnum, sigur Steinbjørn Jacobsen.

### Gleðiligt við nógvum ungum leikarum

Um sjálvan dystin mánakvøldið helt borgarstjórin í Klaksvík, at talan var um eitt ótrúliga flott avrik av klaksvíkingum, og hann vónaði, at avrikini í landskappingini verða minst líka góð, tá ið hon byrjar aftur.

Somuleiðis fegnaðist Steinbjørn Jacobsen um, at tað eru so nógvir ungir leikarar, ið sleppa at royna seg á besta liðnum hjá KÍ, tí tað ber bert boð um, at felagið hevur nógv gott og ungt fólk, sum eru grundarlagið fyri einari góðari framtíð hjá KÍ.

